# Völuspá



**Í hesum døgum vitjar Pétur Eggerz úr íslendska Möguleikhúsið í Føroyum. Endamálið er at føra fram barna- og ungdómsleikin »Völuspá«, sum er einmansleikur á svenskum máli við sello sum fylgispæli**

LEIKUR
*Norðurlandahúsið*

Umframt at grundarstøðið er tikið í felags norrøna skaldskapinum, er ferðandi verkætlanin »Völuspá« gott dømi um norrønt samstarv ídag.

Danin Peter Holst, sum rekur danska barnaleikhúsið Det Lille Turnéeater, hevur skapt og sett upp ferðandi leikin »Völuspá«. Leikurin byggir á nýggjan tekst, sum íslendski rithøvundurin Thórarinn Eldjárn hevur skrivað, bæði á íslendskum og svenskum. Framførslan í Føroyum, sum varir 50 minuttir, verður á svenskum.

Leikari í »Völuspá« er Pétur Eggerz, sum er ein av stovnarunum av Möguleikhúsinum í Reykjavík. Afturat sær hevur hann ein selloleikara, Stéfan Örn Arnarson. Tónleikin hevur íslendingurin Guðni Franzson komponerað og búnarnar og pallmynd hevur norska Anette Werenskiold tilevnað.

Leikurin, sum varð frumframførdur á Listastevnuni í Reykjavík 2001, og har hevur vunnið virðislønir, er fyri børn og ung, ikki yngri enn 10 ár, men tó heilt upp til studentaskúlastøði.

Tónaskaldið Guðni Franzson var við á fyrstu føroysku Listastevnuni.

Umframt at skúlaframsýningar verða, so er høvi hjá almenninginum at sýggja »Völuspá« í Høllini í Norðurlandahúsinum leygardagin hin 25. januar klokkan 16:00.





Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á silvurbrúðleypsdegi okkara, sum var tann 22. oktober 2002 takka vit hjartaliga.
Somuleiðis ynskja vit tykkum eitt av Harranum signa nýggjár.

**Heilsan**
**Fríðgerð og Helgi Mortensen**

# 14 ára gamal drongur álopin

**Um døgurðatíð mikudagin var ein 14 ára gamal drongur álopin. Hann misti vitið, og málið er nú melda til løgregluna**

ÁLOP
*Ingrid Bjarnastein*

Í Kongagøtu, beint við skúlatannlæknan, var ein 14 ára gamal drongur álopin av einum eldri drongi um døgurðatíð mikudagin. Orsøkina til álopið veit løgreglan ikki at siga, men álopni drongurin kendi tann, sum leyp á.

Áleyparin hevði tikið kvørkratak um tann 14 ára gamla, so hann misti vitið.

Rapport verður nú skrivað um álopið, avhoyringar verða eisini gjørdar, og um áleyparin er eldri enn 15 ára gamal verður hann sendur í rættin.

# PRIX

NR. 16 • FRÍGGJADAGUR • 23. JANUAR 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

## Gullið

Teir 29 bólkarnir og solistarnir kappast millum annað um hesar vinningar:

- Ein viku í Lundgaard Studio í Danmark. Vinnarin fær hesa virðisløn.
- Rættin at luttaka í Star Fighters tónleikakappingini, sum verður á Skanderborg Festivalinum. Vinnarin fær hesa virðisløn.
- Konsertframførsla á Jelling Festivalinum. Festivalurin ger sjálvur av, hvønn bólk hann vil hava.
- Konsertframførsla á Nibe Festivalinum. Festivalurin ger sjálvur av, hvønn bólk hann vil hava.
- Konsertframførsla á Listastevnu Føroya. Vinnarin fær hesa virðisløn



*Hjá MC Hár ræður tað vanliga bara um kærleika, men í Prix Føroyum hevur finalupláss eisini nakað at siga*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Dansur um gullkálvin

**29 bólkar og solistar fara at taka lut í Prix Føroyar tónleikakappingini, sum er týdningarmikil og gevandi fyri føroykst tónleikalív. Eingin fæst at viðurkenna, at tað er altumráðandi at vinna kappingina. Finaluplássið tykist hava størri týdning enn endaligi sigurin**

KAPPING
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið verður lagt til brots í stóru Prix Føroyar tónleikakappingini. Talan er um størstu tónleikahending í landinum, og næstu vikurnar fer nógv innan føroyskt tónleikalív at snúgva seg um Prixið.

Um vinnarar og taparar. Um tónleik og framførslur. Og um vónir og vónbrot.

29 bólkar og einstaklingar verða við í kapp-ingini í ár, og seks av hesum hava møguleikan at koma í finaluna, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum 26. apríl. Tá verður mest sum hvørt eygað vent ímóti bólkunum á pallinum, og tað er helst besti møguleiki á árinum at gera vart við seg og sín tónleik.

Prix Føroyar er ein kapping, men meðan fótbóltsfeløg ikki plaga at dylja út yvir, at tey fara eftir gullinum – sigrinum – og ongum øðrum, er støðan ein onnur, tá ið tað verður fregnast millum tónleikarar um hugin at vinna kappingina.

Eingin vil viðurkenna, at sigurin hevur alt at siga, og at alt annað kann verða líkamikið. Svarið er ofta, at tað er ein spurningur um at vera við og at koma fram við sínum tónleiki.

### Nógv gott við kapping

Men hví er tað so neyðugt við kappingarelementinum?

Fróði Vestergaard er samskipari av Prixnum.

– Ætlanin var í fyrstuni at gera eina stóra konsert við føroyskum bólkum í Norðurlandahúsinum, men so stakk spurningurin seg upp, um hvørjir bólkar skulu verða við. Tað var orsøkin til, at Prix Føroyar gjørdist ein kapping við innleiðandi umførum og einari finalu í Norðurlandahúsinum, sigur hann.

– Kappingin hevur eisini nógv gott við sær. Hon skapar spenning og áhuga millum fólk, og bólkarnir kýta seg nógv fyri at spæla væl og hava eina góða framførslu.

– Futti á ferð var forsøgan til Prixið, og tá vóru bólkarnir ofta ófyrireikaðir til konsertirnar. Tað eru teir ikki til Prix Føroyar, sigur Fróði Vestergaard

### Umtala uttanlands

Kanska best kendi bólkurin, sum verður við í kappingini í ár, er rockbólkurin Týr. Teir fingu eitt ordans gjøgnumbrot í kappingini seinast, tá ið teir fyrstu ferð spældu Ormin Langa og komu í finaluna, har teir fóru við einum festivalkjansi í Danmark.

– Vit fingu ótrúliga nógv burtur úr Prix Føroyum seinast, hóast vit ikki vóru millum tríggjar teir fremstu bólkarnar. Vit sluppu á Jelling Festivalin, og vit fingu nógva umrøðu í fjølmiðlum heima og uttanlands, siga teir í Týr.

– Nógvu umtaluna kunnu vit brúka til at marknaðarføra okkum í eitt nú Danmark. Okkara mál er at koma í finaluna, tí bara við at koma í finaluna er nógv vunnið.

### Finalupláss týðandi

Nógvir aðrir tónleikarar, sum verða við á Prixnum, taka undir við hesum sjónarmiði.

– Tað hevði verið feitt at vunnið kappingina, men tað hevur størri týdning fyri okkum at koma í finaluna. Har er góður møguleiki fyri at koma fram, uttan at tú skalt stríðast og strevast fyri tí. Sjónvarpið og Útvarpið senda beinleiðis, og so kunnu vit bara fara inn á pallin, spæla okkara tónleik og vísa, at MC Hár framvegis elskar øll, sigur Jónas Bloch Danielsen, sum er ein av tónleikarunum í rapprockbólkinum.

Rólant av Reyni úr bólkinum Makrel sigur, at teir eru fyrst og fremst við, tí Prix Føroyar er ein góður kjansur hjá føroyskum rockbólkum at sleppa at spæla á væl fyrireikaðum konsertum.

– Tað mangla støð, har rockbólkar javnan kunnu spæla. Prixið er ein góðum háttur hjá bólkum sum okkum at koma fram. Eitt finaupláss hevði verið sera gott, men vit hugsa ikki um at vinna kappingina, sigur hann.